## DAGSINS MEINING

# Skal nú alt landið í baklás?

Vit hava nú havt eitt verkfall í 3 vikur, tí landsstýrismaðurin í Fíggjarmálum ikki er uppgávu sína vaksin. Tað hevur verið frammi, at tað ikki er Karstensa skyld, at vit hava eitt verkfall, ið leggur stóran part av landinum lamið. Tað kann væl verða, men tað er í allarhægsta grad hansara trupulleiki.

Vit mugu minnast til, at Ellintur Abrahamsen hevur bert sínar limir at hugsa um, meðan Karsten Hansen hevur alt landið at hugsa um. Tað líkist rætt og slætt ongum, at Karstin sparir nakrar fáar túsund krónur á nøkrum fáum skipum, meðan samfelagið bløðir milliónir og donsk verjuskip hjálpa okkum. Karsten Hansen fer ivaleyst í søguna sum fíggjarmálaráðharrin við verkføllunum í konfrontatiónslandsstýrinum.

Tað nyttar einki, at vit í miðstaðarøkinum ganga og klappa hvønn annan á herðarnar um, hvussu góður fíggjarmálaráðharri Karsten er, meðan vágamenn einki bensin hava til bilar, og vinnulivið í útjaðarnum missir ordrar fyri milliónir. Karsten sparir nakrar fáar túsund krónur – vit missa milliónir. Skommin liggur á Føroya Landsstýri, ið symptomatiskt sær út til at halda, at ein útoyggjafulltrúi ger mun, tá útjaðarin verður lammaður av tí eina verkfallinum fyri og øðrum eftir.

Sama landsstýrið, sum bert hyggur at, meðan útjaðarin liggur lamin, ætlar sær nú at verða sitandi sum eitt handlingslammað landsstýri. Hvussu verður, tá avgerðir skulu takast? Hvussu verður tá stovnar mangla pengar? Fer man sum við skipara- og navigatørverkfallinum bert at hyggja at, meðan landið spakuliga fer í baglás? Fer man bert at hyggja at og geva mótpartinum skyldina, tá tann eina avgerðin fyri og onnur eftir verður útsett, tí taparnir ikki vilja viðurkenna, at teir hava tapt? Tað má sigast at verða toppurin av ábyrgdarloysi, tá ein løgmaður heldur so fast um løgmanssessin, at hann er villigur til, at Føroya land skal fara í baglás fyri hansara skyld.

Formaður Tjóðveldisfloksins, ið tosar um opnar samráðingar, kann fáa hesar við at seta misálit á løgmann og so fáa eitt formansumfar. Tað hevði ein ábyrgdarflokkur gjørt. Hinvegin, so hevði ein ábyrgdarflokkur eisini fingið ein enda á skipara- og navigatørverkfallinum fyri langari tíð síðan.

Samfelagið fer í baglás, tí at Løgmaður og samgongan uttan meiriluta ikki eru nóg politiskt búnir til at innsíggja, at teir taptu valið. Konfrontatiónslandsstýrið livir upp til sítt navn til tað allarsíðsta.

**Sosialurin**

# Útileikur á ólavsøku

ÚTISJÓNLEIKUR
*Dagfinn Olsen*

Fyrireikingarnar til útileik á ólavsøku eru longu farnar í gongd. Sjónleikarar, tónleikarar, dansarar, hondverkarar og onnur, ið hava áhuga, kunnu møta á fundi á Meiarínum í Havn leygardagin, tá fyriskiparararnir greiða frá tiltakinum, sum mong minnast frá fyrst í nítiárunum.

Mong minnast útileikirnar, sum Gríma skipaði fyri á ólavsøku fyrst í nítiárunum. Sjónleikur, tónleikur, dansur og gykl.

Nú verður hetta tiltak tikið upp aftur. Kanska nøkur teirra, ið sum smærri við fragd upplivdu leikirnar tá, í dag kunnu fara til útileik við egnum børnum. Í øllum førum eru tað serliga børnunum, ið tiltakið er ætlað, men óivað fara bæði ung og eldri at hugna sær, tá rómurin byrja í Havnargøtum.

### Sóknast eftir fólki

Ætlanin er at byrja tvey støð í Havnini. Tvær gongur verða, sum so hittast. Smærri leikir verða so hvørt, meðan gingið verður. Seinni verða so eitt sindur størri leikir, t.d. á Kongabrúnni og endað verður við bryggjuøkið við grótkastið við Skansan.

Føroyar kristnaðar. Hetta er høvuðsevnið í útileikunum á ólavsøku í ár.

Tað er Egi Dam, sjónleikari og leikstjóri, sum stendur fyri tiltakinum í ár. Og fyrireikingarnar eru farnar í gongd, men tað krevur nógv og gott fólk at skipa fyri útileiki.

Tí verður fundur á Meiarínum í Havn leygardagin klokkan 14. Øll, ið hava áhuga fyri útileiki, eru vælkomin á fundin.

Og Egi Dam dylir ikki, at hann vónar, at nógv fólk koma á fundin, tí brúk er fyri nógvum fólkum. Talan er um sjónleikarar, tónleikarar, dansarar, handverkarar og seymikonur og óivað onnur eisini, tí talan er um leik, dans, tónleik og gykl.

Á fundinum verður greitt frá um útileikin og hvussu arbeitt verður frameftir. Byrjað verður so spakuliga at venja í juni.



*Myndacollaga, ið Olivur við Neyst gjørdi eftir útileikirnar í nítiárunum. Nú verður aftur útileikur á ólavsøku og fyrireikararnir vóna, at nógv fólk kemur á fyrireikandi fundin leygardagin*

## VIÐMERKINGAR

# Fólkaræðið til umrøðu

**Súsanna Dam**



Seinastu dagarnar er valúrslitið tugt og tanlað og útlagt, sum hvørjum hóvar, og tað er vist eisini í fínasta lagi. Hvør roynir at fáa sum frægast burturúr til sín sjálvs. Men so eru nøkur av teimum, sum halda seg hava funnið hin einasta rætta politikkin, farin undir at tyggja og tanla atburðin og siðalæruna hjá teimum veljaranum, sum ikki hava valt Tjóveldisflokkin og alla hansara dýrd, og hetta er eftir mínari meting ein hin størsta orsøkinin til ikki at geva teimum mína atkvøðu.

Meðan vit enn eru undir danskari grundlóg, havi vit bæði loyvi og rætt til at velja politikk eftir egnari sannføring. Tað er snøgt sagt grundarlagið undir fólkaræðinum, hetta at valúrslitið skal vísa hvønn politikk fólkið vil hava. Men slíkar smálutir boyggir trúgvi tjóðveldisveljarin seg at vísa seg ikki fyri. Kanska eru tey longu farin at liva eftir eini tillagaðari føroyskari grundlóg?

Eg valdi ikki Tjóðveldisflokkin, tí eg ræðist hendan flokkin, og tað hann hevur myndað hesi seinastu árini. Har ræður ein hóttandi fanatisma undir leiðslu av einum tølandi droymara, sum hugfarsliga sveimar langt úti í rúmdini, heilt uttan samband við gerandisdagin. Hjálparprestur, ein líka so veruleikafjarur hetjutilbiðari, brølar sín boðskap yvir dalar og fjøll á ein hátt sum ger, at eg ikki kann annað enn sleppa mær avstað, ræðslusligin. Tey siga, at hetta snýr seg ikki um persónar, men um mál, men lívið hevur lært flestøll, at eingin keta er sterkari enn hitt veikasta liðið, og tað er eisini galdandi her.

Har kom ein lýsing í Sosialin dagin fyri valið, av misgáum varð sagt. Mistøk henda har sum mannahond hevur verið, tað vita vit øll, og tað kann eg eisini góðtaka, men tað at nakar her í Føroyum skal hava funnið uppá at gera eina slíka rasistiska mynd sigur alt.

Til endans má eg so bara staðfesta, at tey, sum siga seg stríðast sítt ítarsta fyri tjóðarfrælsi og -æru, helst ikki eiga minsta vet av teirri muru, sum er íborðin frælsum menniskjum og tí fekk/fær tjóðveldisflokkurin ikki mína atkvøðu.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Anja Weihe anja@sosialurin.fo
**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.






## Tinghellan



# Har grannar semjast væl

**Føroyingar trívast alt ov væl í stríðnum millum tveir nærum eins sterkar politiskar bólkar. Tað er í hesum veruleikanum, at telvingin um, hvussu landið skal stýrast, skal taka støði, og landsins stýri skipast. Kári á Rógvi hugleiðir í dag á Tinghelluni um, hví ein smøl samgonga er søguliga skilaleys og hvussu føroyingar í staðin eiga at skipa breiða semju við rúmd fyri sjónarmiðunum hjá bæði sambandshugaðum og sjálvstýrissinnaðum**

*Kári á Rógvi*



Í 1946 var fólkaatkvøða í Føroyum. 48,6% valdu loysing, 47,2% eina nýskipan av amtstøðuni, og 4,1% valdu hvørki.

Í 2002 var løgtingsval í Føroyum. 48,9% valdu fullveldissamgonguna, 46,9% nýskipanarhugaðu andstøðuna, og 4,2% miðflokkin, ið fyri valið valdi hvørgan blokkin.

Føroyingar eiga tí helst heimsmet í jøvnum valúrslitum, og hetta býtið sæst eisini næstan altíð í meiningarkanningum. Nærum helvtin vil eitt, nærum helvtin vil annað. Og nøkur fá vilja hvørki — ella okkurt triðja.

### Mentanin

Fyri okkum á Tinghelluni er onki nýtt í hesum. Hetta er føroysk valmentan. Føroyingum dámar best tveir nærum líka sterkar partar. Havnin móti bygdunum. HB móti B36. Grannabygd móti grannabygd – í skúlagarðinum dreingirnar móti gentunum. Tað er ein tryggleiki í hesum. Stríðið, sum ongantíð endar, merkir, at ongin partur hevur møguleika at kúga hinar.

Ert tú vaksin upp sum limir í ítróttarfelag ella sum eigari í einum haga, kennir tú føroyska valmentan. Okkum dámar at arbeiða uppá hvønn annan, serliga aftan á aðalfundin, men skal felagið halda fram, ella skal hagin geva nakað av sær, má semja finnast.

Fara fólk at atkvøða, gerst ósemja. Tað frægasta er altíð at tosa um tingini til ein semja fæst. Síðani er at staðfesta semjuna uttan atkvøðugreiðslu. Sjálvur havi eg ongantíð verið við til at atkvøtt í mínum haga. Tí tann dagin, vit býta okkum í samgongu og andstøðu, verður ikki verandi í haganum fyri klandri.

### Semjan

Men, er ikki øll meiningin við valinum, at summi skulu tapa? Skulu tey ikki tveitast út í andstøðumyrkrið, har politiskur grátur er og mikið tannagrísl? Skulu ikki seytjan samgongumenn syngja so listaliga í skaðafrøði og skifta ágóðan millum sín?

Nei. Demokrati er ikki at meirilutin ræður. Demokrati er, at øll eiga rætt at røða, siga sína hugsan og føra fram síni sjónarmið. Flokkarnir eiga ávirkan eftir tingmannatali, og hvør tingmaður eigur at fáa høvi at seta síni hugsjónarligu fingramerki.

At lata meirilutan ráða er altíð ein neyðloysn, tá skilaprát og opið orðaskifti ikki førir á mál.

Teir, ið skulu líta á hvønn annan á vøllinum ella í bjørgunum, kunnu ikki liva við øðrum enn breiðari semju. Tað sama skuldi verið galdandi fyri tey, ið ráða fyri borgum.

### Ella ímóti stríða

Vit hava eitt ræðandi dømi í søgu okkara um ósemju. Tá kristna trúgvin kom til norðurlanda, tóku teir hana sjálvsagt til viðgerðar á tingi. Hjá okkum var tað Sigmundur Brestisson, ið legði uppskotið fyri Tingið. Hann legði fram nakað, ið minti um ein hvítbók, í fyrstu atløgu miseydnaðist, men hann royndi aftur og fekk so meiriluta fyri at kristna Føroyar.

Henda framferð var so harðlig, at vit fingu borgarastríð í Føroyum. Sigmundur sjálvur varð dripin, og mikil hurðluvasi stóðst, áðrenn breiða semjan kom uppá pláss, tá Leivur Øssurson og Tóra Sigmundsdóttir skipaði samgongu við Gøtutróndi sum samráðingarleiðara.

Til samanberingar dugdu íslendingar betur. Teir samtyktu kristnitrúnna — men við undantøkum. Fólk sluppu framvegis at eta rossakjøt (sum kirkjan ikki vildi tá), fólk sluppu í eini skiftistíð enn at seta børn út, og tað skuldi vera loyvt at dyrka gomlu gudarnar í loyndum.

### Land og tjóð og alt hattar har

"Hvussu skal tað vera úti í verðini?" segði omman mín altíð. Í Norðurírlandi heldur helvtin av fólkinum seg vera bretar, hin helvtin írar. Har er nærum ógjørligt at semjast. Í Ísrael er neyvan gjørligt at semjast heldur um nakra nøktandi loysn fyri allar partar.

Men, í Føroyum? Vit eru øll so hjartaliga samd um, at Føroyar eru eitt land, føroyingar fólk og tjóð. Semja er um, at vit kunnu fara okkara veg, tá tað passar okkum, at sjálvsavgerðarrætturin er ómissandi.

Grundlógararbeiðið vísti, at føroyskir tingmenn kunnu finna fram til eina semja, ið fevnir um allar flokkar. Ikki soleiðis at skilja, at als ongin ósemja er, uttan heldur tað, at eftir veljarastyrkini kunnu allir flokkar fáa sína ávirkan á eina avtalu, ið staðfestir semjurnar og skipar mannagongdir at loysa ósemjurnar.

Uttan mun til um ella nær vit loysa frá danska ríkinum, so eigur tað at standa høgt og heilagt í eini føroyskari evstulóg, hvussu føroyingar sjálvir fata seg og sína støðu.

Tað er heldur ikki neyðugt at tengja hesa breiðu semjuna um tað ríkisrættarliga og tað stýrisskipanarliga at semju um øll onnur mál.

### Grindatunnupolitikkurin

Hví ber so ikki til at semjast um hetta, fáa pappír uppá hesa semjuna? Amerikanarar hava hugtakið 'pork-barrel politics'. Hetta er mynd frá gomlu døgum, tá ein maður í bygdini goymdi allar tunnurnar við tí saltaða svínakjøtinum at hava til matna um veturin.

Vit kunnu kalla hetta grindatunnupolitikk. Føroysku flokkarnir eru vanir at skipa smalar samgongur, ið síðani skifta grindina millum sín. Samgongumenn fáa hvør sín part, andstøðan fær onki.

Hetta var meiri týðiligt fyrr, tá tingið lat einstøk veðhaldslán og játtaði alskins stundningar. Men eisini á ríkisrættarliga økinum síggja vit, at flokkarnir hugsa, at jú smalari samgongan er, jú meir sleppa tey einsamøll at bestemma.

### Eina breiðsemju

Tónleikabólkurin Harkaliðið sang um støðuna hjá eldra føroyinginum til samríki við Danmark: "eg valdi báðar vegir, og teir arvar tú frá mær". Og tað er so. Vit hava arvað júst somu støðu sum í 1946 — og í ár 1000 — vit velja báðar vegir.

Tað óhepna í ár 1000, í 1946, í 1948, í 1998, og kanska eisini í 2002, er at vit ikki gera breiðar semjur um tey stóru málini. Sjálvt tá vit fara frá eini skipan til aðra, mugu vit sum íslendingar á sinni geva tí tapandi partinum høvi at venja seg við tankan.

Øll val eru søgulig, hetta valið skarar tó framum á tann hátt, at tað er avgerandi neyðugt at finna eina breiða semju, tí tað stendur á jøvnum — annars kunnu vit vænta umval til løgtingið.

Ætla vit at seta semjuna í Stýrisskipanarlógina ella eina aðra evstulóg, ið kemur fyri hana, krevur tað tvey løgting á rað. Tað merkir í sjálvum sær, at tað er neyðugt við breiðari semju.

Gamla sálmareglan sigur: "Um tú vilt gleði finna, søk ei til hægsta sal. Nei, eydnan er at finna, har grannar semjast væl." Sum í høgunum og í ítróttarfeløgunum er semjan í sjálvum sær ofta meiri verd enn tað, semjan er um. At semjast er meiri týðandi enn innihaldið í semjuni.

Fyri okkum politisku áskoðarar á Tinghelluni er ein valgysari sum tann í ár altíð tað besta undirhaldið. Í so máta er valið hesuferð sum ein HM-finala, ið skal avgerast við brotssparkskapping. Støðan er 16-16, og vit eru um at skrædna av spenningi.

Men fyri hetta lítla landið var tað best, um partarnir samdust um nýggjar politiskar spælireglur fyri Føroyar. Tað er ongin meining í at kappast, um vit ikki eru samd um spælireglurnar. Tá føroyingar vilja hava bæði samband og sjálvstýri, eiga vit at geva teimum eina skipan, ið rúmar báðum.

